







# Føroyskt uttanríkisráð



JØRGEN NICLASEN
floksformaður
Fólkaflokkurin

**Tað er úti í heimi vit skulu vinna meiri vøkstur og føroyska vælferð**

Í Føroyum er alt ov lítið gjørt við uttanríkismál. Hóast tað í heimastýrislógini er ásett at uttanríkismál er danskt málsøki, munnu øll vita at danir brúka sínar kreftir til danskan og ikki føroyskan uttanríkispolitikk. Taka vit uttanríkispolitisku heimildarlógini, gevur hon okkum betur møguleikar, men ikki nógmikið. Vit kunnu siga, tað er ein lóg sum gevur okkum loyvi at spæla "harri í húsið". Uttanríkispolitikkur hoyrir til suverenitetin, og tí er neyðugt at broyta okkara ríkisrættarligu støðu, um vit skulu virka frítt og frælst á uttanríkispolitiska økinum.

**Frælsan felagsskap**
A-liðið vil tí á Fólkatingi slóða fyri einum frælsum felagsskapi millum Føroya og Danmarkar. Ein felagsskap við tveimum líka pørtum. Ein ríkjafelagskap, heldur enn ríkisfelagsskap. Slíkur felagskapur tryggjar føroyingum somu rættindi í Danmark sum danir hava og tryggjar donum somu rættindi í Føroyum sum føroyingar hava. Men hesin ger okkum til suverenan samstarvspart í samráðingum við øll heimins lond. Vit mugu víðari.

**Landsstýrismann í Uttanríkismálum**
Hóast løgmaður hevur roynt at ment okkara uttanríkispolitiska pall, er tað bert ein partur av hansara málsøkjum. Vit eiga beinanvegin at seta landsstýrismann við uttanríkismálum burturav. Okkara sendistovuvirksemi má mennast og koma longur út í heim. Sum lítið land eiga vit at samstarva við okkara norðurlendsku familju. Har vit ikki sjálvi hava sendistovu, eiga vit at gera samstarvsavtalu við tað norðanlandið, sum gevur okkum bestu møguleikarnar, eisini sæð í mun til kostna.

**ES og EFTA**
Á Fólkatingi og í Tinganesi vil Fólkaflokkurin slóða fyri EFTA-limaskapi og ES-avtalu um tey 4 frælsini. Gjøgnum EFTA fáa vit handilsavtalur við hópin av londum uttan fyri ES. Eisini kunna vit gjøgnum stóra EFTA-aparatið tryggja størri tyngd í samráðingum, eisini við fjarskotin lond.

Avtalan um tey 4 frælsini við ES tryggjar vørum, tænastum, kapitali og persónum frítt at fara millum Føroya og ES. Ein avtala sum tryggjar okkum stórar møguleikar í alheimsgerðini.

Mest framkomnu smátjóðir, hava vunni stórt ríkidømi uttan fyri síni lond. Nevnast kunnu Ísland, Hong Kong, Singapor, Luksemborg og Liktinstein.

Framá við A-liðnum

# Avbjóðingar á Fólkatingi við Javnaðarflokkinum



ANDRIAS PETERSEN
løgtingsmaður
Javnaðarflokkurin

Javnaðarflokkurin býður seg fram til Fólkatingsvalið við tí fyri eyga at gera eitt dygdargott arbeiði fyri Føroyar og tað fólkið, ið her býr.

Javnaðarflokkurin hevur eina langa siðvenju at sita á Fólkatingið og at arbeiða saman við donskum politikkarum og sjálvandi saman við donsku sosialdemokratunum sum hava sama hugsjónargrundarlag sum vit. Hetta samstarv hevur søguliga sæð givið úrslit soleiðis, at Føroya fólk hevur fingið lut í teimum vælferðarframbrotum sum eru hend í hinum norðanlondum, her hugsið eg um t.d. fólkapensiónina á sinnið, útbúgvingarstuðulin, heimahjálpina o.s.fr.

Javnaðarflokkurin var høvuðsarkitekturin aftanfyri heimastýrislógina, sum hevur verið grundarsteinurin undir tí politisku og samfelagsligu menning, ið er farin fram her á landið, síðan 1948.

Men tíðir broytast, einki stendur í stað. Í hesum valskeiðinum, við Javnaðarflokkinum á odda í Føroya landsstýri, er gjørt ískoyti til heimastýrislógina, tann sokallaða yvirtøkulógin, har avgerðir um framtíðar yvirtøkur verða lætnar upp í hendurnar á Føroya Løgtingi og harvið Føroya fólki og ongum øðrum.

Eftir hesi lóg, hevur henda samgonga, undir skipaðum viðurskiftum, uttan samanbrest við danir, yvirtikið fjølmiðlaábyrgdina, tilbúgvingina, vinnuløggávu og ikki minst fólkakirkjuna. Vit í Javnaðarflokkinum eru nøgd og errin av hesi gongd. Okkara samfelag mennist, vit fáa fyrisitingarførleika og vit fáa høvi at smíða nýggjar lógir, sum hóska til okkara samfelag. Eingin yvi er um, at vit við yvirtøkulógini fara at mennast framyvir og vit fara at útbyggja okkara land og okkara førleika um vit fara fram hóvliga og skilagott.

Tað standa nógvar avbjóðingar fyri framman. Nógvar avbjóðingar har Javnaðarflokkurin á Fólkatingið kann gera mun, um hesin sessur verður nýttur rætt, til at ávirkað og upplýsa tað donsku politisku skipanina til okkara fyrimun. Tá kunnu átrokandi og avgerðandi mál fyri Føroyar og føroyska vælferð loysast. Eg hugsið her um okkara tilgongd at koma við í felagsskapin EFTA, har Ísland, Noreg, Sveits og Lichtenstein eru limir, og okkara møguleika at fáa samstarv við ES felagsskapin umvegis EFTA.

Ein onnur avbjóðing í mun til ES, er okkara roynd at fáa lut í undirvísingar og granskingar samstarvinum í ES. Har eigur eitt arbeiði, at ávirka donsku politisku skipanina, ígjøgnum fólkatingsumboðan, at hjálpa til at fáa loyst hetta sera átrokandi mál. Tað er ein avgerðandi fortreyt fyri menning og framburð her á landi, at vit sleppa at luttaka á jøvnum føti innan hetta útbúgvingar og menningararbeiði, so vit ikki gerast eftirbátar á hesum øki, men ístaðin byggja eitt nútímans alheimsgjørt samfelag, har fólkið og serliga ungdómurin fær virkað í alheimsgerðini, og á tann hátt tryggja vit støðuga menning, bæði mentunarliga og vinnuliga, so at Føroyar framhaldandi eins og nú, verða eitt gott valferðarsamfelag at vaksa upp í, at virka í, og at eldast í.

Vel tí Javnaðarflokkin á Fólkating.

# Vit velja loysnirnar



KRISTIAN MAGNUSSEN
Løgtingslimur og valevni
Javnaðarfloksins

Týsdagin 13. november skulu vit øll avgera um vit velja loysnirnar ella konfrontatiónirnar.

Javnaðarflokkurin hevur meiri enn nakar annar flokkur verið tann, sum hevur víst á gongdar leiðir, eisini í ríkisfelagsskapinum.

Tað er ein sannroynd, at vit undir heimastýrisskipanini hava megna at uppbygt vælferðarsamfelagið Føroyar. Javnaðarflokkurin var arkitekturin aftanfyri skipanina.

Meðan onnur bert síggja forðingar, hava vit í Javnaðarflokkinum bert avbjóðingar.

Meðan onnur siga, at einki skal broytast, so trýsta vit á fyri at flyta mørk, har tað er neyðugt fyri okkara virkisføri.

Javnaðarflokkurin hevur altíð slóða fyri yvirtøkum og fyri størri sjálvræði, men samstundis hava vit varðveitt gott samstarv við Danmark.

Javnaðarflokkurin spælir ikki hasard við vælferð og trivnaði okkara, men vit eru einasti flokkur, sum áhaldandi flytir mørkini í ríkisfelagsskapinum.

Latið okkum á valinum standa saman um, at varðveita og økja um okkara vælferð og virkismøguleikar, eisini á fólkatingi.

# Betri sjúkraviðgerð og útbúgvingarmøguleikar



JØRGEN NICLASEN
floksformaður
Fólkaflokkurin

A-liðið vil slóða fyri útbygdum møguleikum fyri útbúgving og heilsurøkt.

Framstig eru hend innan útbúgvingarmøguleikar, men vit vilja longur. Føroyskur ungdómur skal hava betri og fjølbroyttari møguleikar at útbúgva seg. Eisini skal granskingarsamstavið við danmark og ES økjast.

Innan heilsurøkt mugu vit koma longur. Ríkissjúkrahúsið er staðið, flestu føroyingar kenna sum møguleikan uttan fyri Føroyar. Eitt fólkafloksumboð á Fólkatingi vil slóða fyri víðkaðum heilsusamstarvi, bæði í Danmark og eisini víðari inn í ES. Vit rinda fyri allar okkara viðgerðir og eiga tí at geva føroyskum sjúklingum eina nógv størri viftu at velja ímillum. Sjúklingar eiga at fáa bestu viðgerð, og tað er ikki altíð Ríkissjúkrahúsið, sum kann bjóða tað.

Okkara heilsustarvsfólk eiga eisini at fáa møguleika at koma á sjúkrahús runt um í Europa. Hetta fyri at menn teirra førleika.

Víðka heilsusamstarv eigur eisini at virka við til at serfrøði úti í heimi kann koma til Føroyar at veita okkum heilsubót.

A-liðið vil víðka um møguleikarnar til útbúgving og tryggja okkum bestu sjúkraviðgerð í Europa.

Fram við A-liðnum

Lesið Sosialin -so eru tit við!